VINNUHÁSKÚLIN
Trygdardepilin

# <u>Heilsuváttan til sløkkiliðsfólk</u>

Heilsuváttan til sløkkiliðsfólk sbrt. kunngerð nr. 150 frá 17. desember 2001 um útbúgving av sløkkiliðsfólki § 2. 1. **<u>Heilsuváttanin er galdandi í 2 ár.</u>**
Heilsuváttanin er tilevnað í samstarvi við DEILDINA FYRI ARBEIÐS- OG ALMANNAHEILSU, sum hevur mælt til eftirfylgjandi leiðbeinandi tekst:

> ”At luttaka í bjargingararbeiði og t.d. at sløkkja eld kann vera sera strævið arbeiði. Í slíkum førum kann bjargingar- og sløkkiliðsfólkið koma undir eitt so stórt sálarligt og likamligt trýst, at tað verður ein verulig byrða fyri hjarta/æðralagið. Um fólk ikki eru væl fyri bæði sálarliga og likamliga, kann lívshættislig støða standast av. Um t.d. ein maður í miðjum árum er eitt sindur prúður, roykir og ikki er likamsvirkin, so er væntandi, at hansara ”kondition” er so vánalig, at tá hann skal roykkava í nógvum hita og ræðandi umstøðum og møguliga eisini bera tunga byrðu, so orkar hann illa - og hevur hann tá kálking í hjartaæðrum, kann vandi standast av.
>
> Vegna tær tungu likamsbyrðarnar kann sløkkiliðsfólkið eisini fáa ilt í ryggin, um hann/hon ikki er likamliga sterk/ur, tí í tílíkum arbeiði er stundum neyðugt at arbeiða í stak óhøgligu arbeiðsstøðum - lyfta, draga ella trýsta nógv meira, enn vanliga verður gjørt í arbeiði.
>
> Eisini er umráðandi, at persónur, sum átekur sær slíkt arbeiði, er sinnisliga væl fyri, soleiðis at hann ikki missir ræðið á sær sjálvum, tá ið á stendur.
>
> Hetta verður sagt sum ein áminning til teirra, ið ætla sær at gerast roykkavarar, tí flest fólk hava sjálvi ein góðan varhuga av hvat tey klára, bæði sálarliga og likamliga. Um viðkomandi sjálvur er í iva, eigur hann at tosa við læknan um málið, soleiðis at hesin kann fáa høvi at geva sína meting.”

Navn: ____________________________________________

Føðingardagur/ár: ____________________________________________

Gøta/vegur: ____________________________________________

Postnr. bygd/býur: ____________________________________________

Sløkkilið: ____________________________________________

desember 2003

## 1. Frágreiðing umsøkjarans

| Hava tygum ella hava tygum nakrantíð havt:<br><br>(Um so er, skal sjúkan verða nevnd við navni og tilskila skal verða, nær ið hon tók seg upp, hvussu leingi hon stóð við og møguligar eftirsjúkur. Hvørjum spurningi skal verða svarað sær og ikki er loyvt at seta endurtøkumerki ella klombrur um fleiri spurningar. – Er einki at siga frá. Eigur ”nei” at verða skrivað í avvarandi teigi). | |
|---|---|
| a. Íðuligt krím (hosta, hálstak, hæsi)? | |
| b. Svimbul, varandi ella íðuligt afturvitjandi høvuðverk, ov høgt blóðtrýst, svímilsi, krampa, lamning, nerva- ella sinnissjúku? | |
| c. Eygnasjúku?<br>Nýta tygum eygnagløs?<br>Skili til hvussu sterk eygnagløs, tygum nýta. | |
| d. Oyrnasjúku (pínu, runni úr oyrunum, ringa hoyrn)? | |
| e. Lungnabruna, trongd, bróstmøði, lungnatu-berklar, spýtt blóð, lungnahinnubruna, slím á lungunum? | |
| f. Sjúkur í hjarta, æðrum, blóði, bringutak (t.e. pínu um hjartaleiðina)? | |
| g. Magasár, sár á gørnunum, spýð blóð, blóð í skarninum, aðrar maga- garnsjúkur. | |
| h. Gallstein,gulusótt, sjúku í livrini, gallinum ella miltinum? | |
| i. Nýrnabruna, eggjahvíta, vág ella blóð í landinum, nýrastein, nýraherðindi ella aðrar nýrnasjúkur; sjúku í bløðruni ella aðrastaðni í landgøgnunum? | |
| k. Eitlasjúkur, knútarósin? | |
| l. Giktfepur ella aðrar ígerðarsjúkur, giktsjúkur, hald ella ilt um lendarnar? | |
| m. Sjúkur í liðum, knotum ella ryggi? | |
| n. Vøkstir (knyklar, finnar ella aðrar nývøkstrir)? | |
| o. Húðsjúku? | |
| p. Sukursjúku ella sukur í landinum? | |
| q. Rættiliga gikt. Basedows sjúku, aðrar evnabroytingarsjúkur? | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| r. Aðrar sjúkur umframt vanligu barnasjúkurnar? | | | |
| 2. a. Hava tygum nakrantíð verið fyri álvarsligum vanlukkum? Um so er nær? | | | |
| b. Eru enn eftirbrek? Um so er hvørji? | | | |
| 3. a. Hava tygum ligið á sjúkrahúsi, bróstsjúkrahúsi ella øðrum heilsubótarhúsum? | Hvar? | Fyri hvat? | Nær? |
| b. Hava tygum ligið undir skurði? | Hvar? | Fyri hvat? | Nær? |
| c. Hevur serlækni kannað ella viðgjørt tygum? | Hvør (jir)? | Fyri hvat? | Nær? |
| d. Hava tygum havt tilhald í landi uttan fyri Evropa? | Hvar? | Nær? | Hvussu leingi? |
| 4. Spurningur til konufólk:<br>Hava tygum havt ávísar kvinnusjúkur? | Hvørjar? | | Nær? |
| | Omanfyri standandi spurningar havi eg svarað eftir bestu sannøring míni.<br><br>______________________________<br>Staður og dagur, ið undirskriva er:<br><br>______________________________<br>Undirskrift umsøkjarans (við læknaðun hjástøddum) | | |

## 2. Kanning læknans

<table>
<tr><td>Eru tygum vanliga lækni hjá umsøkjaranum?</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td>Hvussu leingi hava tygum kent hann/hana?</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td>Kenna tygum hann/hana ikki, hvussu hava tygum tá vissað tygum, at hann/hon, ið tygum nú kanna, er tann, hann/hon sigur seg at vera?</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td>Vita tygum nakað at leggja aftrat tí, sum umsøkjarin frammanfyri hevur greitt frá?</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td rowspan="2">A.<br>Vakstrarlag:</td><td>klæntraligur ☐</td><td>miðal ☐</td><td colspan="2">menniligur ☐</td></tr>
<tr><td colspan="2">Hædd (í skóm)<br>……………cm</td><td colspan="2">Tyngd (í ongum frakka)<br>……………kg</td></tr>
<tr><td>B. Bendir útsjóndin á, at nakað bilar heilsuni?</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td>Finna tygum nakað órættvorðið, tá ið tygum kanna:</td><td colspan="4">um so er, so lýsið tað gjølliga:</td></tr>
<tr><td>C. a. Høvur og háls?</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td rowspan="3">b. Eygu?</td><td>Sjónin?</td><td colspan="2">við ongum gløsum</td><td>við vanliga nýttum gløsum</td></tr>
<tr><td>á høgra eyga</td><td colspan="2"></td><td></td></tr>
<tr><td>á vinstra eyga</td><td colspan="2"></td><td></td></tr>
<tr><td>Litsansin?</td><td colspan="4">☐ Ishihara, Compl. Ed., ……….árg.<br>☐ Bostrom & Kugelberg, 1944</td></tr>
<tr><td>c. Oyru (hoyrnia)?</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td>d. Munn, svølgrúm og tenn?</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td>e. Taluna?</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td>D. a. Bróstgrind og lungu?</td><td colspan="4"></td></tr>
</table>

<table>
<tr><td>E. Hjarta og æðrar?</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td rowspan="4">Um lívæðrasláttin skal altíð verða frásagt:<br><br>Blóðtrýstið (3 mátingar við í minsta lagi einum minutti ímillum; útgevingar-trýstið skal verða lisið, tá ið tónin hvørvur. Hin kannaði eigur at hava hvílt seg ið hvussu so er í 5 min., áðrenn máta verður):</td><td colspan="2">Stev:</td><td colspan="2">Títtføri:</td></tr>
<tr><td>Samantøkutrýst</td><td>1.</td><td>2.</td><td>3.</td></tr>
<tr><td>Útgevingartrýst</td><td>1.</td><td>2.</td><td>3.</td></tr>
<tr><td colspan="4">Tólið hevur ☐ kyksilvur ☐ dósatrýstsmát<br><br>Hvussu eitur tólið?_______________________________</td></tr>
<tr><td>F. Búk og kvið (ífylla, vøkstur á gøgnum, sáreyki, arr, tarmalop)?</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td>G. Rygg og útlimir<br>(slættir iljar og æðraknútar)?</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td>H. Húð og eitlar?</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td>I. Nervalagið (serstakliga lamningar, skjálg, órættvorin sjónaropnu-, knæskelja- og iljaafturbrøgd)?</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td>K. Onnur lívgøgn?</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td>L. Er í vatninum at finna:<br>(Hevur hin kannaði/a ikki vatnað sær hjá læknanum, skal hann/hon her vátta við undirskrift síni, at vatnið er frá honum/henni):<br><br>________________________________</td><td colspan="4">☐ eggjahvíti ☐ blóð<br><br>☐ vágur ☐ sukur</td></tr>
<tr><td>Halda tygum hin/a kannaða/u vera fríska/n, heilt arbeiðsføra/n og egnaða/n til útkall til sløkki- og bjargingararbeiði.<br><br>Um so er ikki, hví?</td><td colspan="4"></td></tr>
<tr><td></td><td colspan="4">Kanningardagur:____________________________201<br><br>Undirskrift læknans:______________________________<br><br>________________________________________________<br>Stempul læknans (ella navn og bústaður við spjaldrastaðum)</td></tr>
</table>